umhvørvisstovan

KVÍVÍKAR KOMMUNA
VÍKARVEGUR 4
340 KVÍVÍK
FØROYAR

Argir hin 21. juni 2016
Málsnr.: 16/00276-12
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Mortensen

# Loyvi til aftursøkking

## 1 Loyvi og heimild

Sambært grein 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, veitir Umhvørvisstovan við hesum Kvívíkar kommunu loyvi til at aftursøkkja sand, sum ætlanin er at taka upp úr bátahylinum á Válinum, og aftursøkkja hann norðan fyri bátahylin.

## 2 Umsóknin

Hin 13. apríl 2016 fekk Umhvørvisstovan umsókn frá Kvívíkar kommunu um loyvi at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp í bátahylinum á Válinum. Samlaða nøgdin, sum verður tikin upp er mett til uml. 4.000 $m^3$. Søkt verður um loyvi at søkkja tilfarið norðan fyri bátahylin, sí hjálagt kort.

## 3 Ummæli

Sambært grein 5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverk og avvarðandi kommunu til ummælis.

Hin 26. apríl 2016 varð umsóknin send Fiskimálaráðnum, Landsverki, Vestmanna og Kvívíkar kommunur til ummælis.

Í skrivi frá Vestmanna kommunu dagfest 3. mai 2016 verður sagt frá, at kommunan viðmælir umsóknini treytað av, at sandurin ikki legst í siglingarrennuna inn til økið, har ferjulegan í Vestmanna var, og har stórt ferðavinnuvirksemi er, ella er til ampa í bátahylinum í Vestmanna.

Vestmanna kommuna mælir eisini til, at umhvørvis- og árinskanningar verða gjørdar áðrenn sandurin verður aftursøktur, eins og botn- og dýpdarkanningar áttu at verið gjørdar, soleiðis at tað seinni verður møguligt at staðfesta, um aftursøkkingin av sandinum hevur havt ávirkan á siglingarrennuna ella bátahylin í Vetsmanna.

Í skrivi dagfest 4. mai 2016 mælir landsverk til, at ein meting verður gjørd fyri útlitini at sandurin verður liggjandi, tí økið er grunt, og kann tí fara við streyminum, og møguliga verða til ampa. Eisini ger landsverk vart við, at teimum vitandi er grótkastið í bátahylinum lagt á

sandbotnin, og við at tøma sand ov tætt at grótkastinum kann hetta føra við sær, at tilfar ryður undan grótkastinum.

Í skrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 8. mai 2016, verður sagt frá, at Fiskimálaráðið ikki hevur nakrar viðmerkingar, eftir at umsóknin hevur verið til ummælis hjá bæði Vørn og Havstovuni.

# 4 Kanningar av botntilfarinum

Umhvørvisstovan hevur ikki orsøk til at halda, at sandurin inniheldur dálkandi evnir, og tí verður ikki sett krav um at gera kanningar av sandinum.

# 5 Avgerð

Umhvørvisstovan metir, at sandurin, sum er savnaður í bátahylinum hevði verið aðrastaðni á økinum nærhendis, um eingin bátahylur var á staðnum, og at sandurin tí neyvan fer at verða til stórvegis ampar. Tí hevur Umhvørvisstovan tikið avgerð um at loyva søkking av umleið 4.000 $m^3$ av sandi norðan fyri bátahylin á Válinum, sum víst á hjálagda korti.

Avgerðin er grundað á tilmælini í málinum og egnar metingar.

## 5.1 Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

5.1.1 Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin sambært grein 10 er úti, t.v.s. 4 vikur frá at avgerðin er lýst.

5.1.2 Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum er tilskilað í umsóknini.

5.1.3 Kvívíkar kommuna skal fylgja við, um sandurin verður liggjandi á staðnum, og hvar hann møguliga flytir seg.

5.1.4 Kommunan skal ansa eftir, at sandurin ikki verður tikin ov tætt at grótkastinum, og harvið taka støðið undan tí.

5.1.5 Um ampi stendst av aftursøkkingini, skal Kvívíkar kommuna seta bøtandi tiltøk í verk.

5.1.6 Umhvørvisstovan skal í seinasta lagi átta dagar frammanundan hava boð um nær arbeiðið byrjar. Eisini skal boðast frá, beint eftir at arbeiðið er liðugt.

5.1.7 Nøgdin, sum verður aftursøkt skal skrásetast saman við tíðarskeiði, knattstøðu, dýpi og hvaðani tilfarið er tikið. Tá arbeiðið er liðugt, skal frágreiðing sendast Umhvørvisstovuni um hvussu nógv er aftursøkt, nær arbeiðið varð gjørt o.s.fr.

5.1.8 Er arbeiðið ikki gjørt eitt ár aftan á at loyvið er givið, fellur loyvið burtur.

## 6 Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Kvíkvíkar kommuna skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Umhvørvisstovan kann útinna eftirlitið.

## 7 Gjald

Kvívíkar kommuna skal, sambært kunngerð nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum, rinda fyri ta viðgerð, Umhvørvisstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

## 8 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýriskvinnuna í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum saman við neyðugum skjølum, sendir hana til landsstýriskvinnuna.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Suni Petersen, Deildarleiðari

/

Heidi Mortensen, umhvørvisviðgeri

Mynd av bátahylinum á Válinum. Grøna økið vísur hvar tilfarið verður aftursøkkið.

